# Meginfelag Útróðrarmanna

Aðalfundur felagsins verður sunnudagin 7. mai kl. 14 á Hotel Hafnia. Umframt føstu skránna sum er ásett í viðtøkunum koma hesi mál fyri.

1. Uppskot um broytingar í viðtøkunum
2. Støðutakan til limagjald til Ráfiskaseljarafelagið
3. Viðgerð av álitið sum arbeiðsbólkur skrivaði við tí endamáli at bøta um inntøkutrygdina.

Skjølini hesum viðvíkjandi eru send til limafeløgini og eru annars at finna á heimasíðu okkara www.megf.fo undir síðuni »Kunning MÚ«.

**Meginfelag Útróðrarmanna**

**Sjúkrasystraskúli Føroya**
Eirargarður 14 B - FO 100 Tórshavn
Telefon 31 35 40 lok. 435/436
Telefax 31 39 26

# Sjúkrasystraskúli Føroya

Nýggjur flokkur av sjúkrasystralesandi byrjar **1. september 2000.**

Vilt tú hava eina útbúgving, har tú:

-ført stórar avbjóðingar, nógvar valmøguleikar og brúk fyri tínum persónligu eginleikum og hollari ástøðiligari vitan.
- hevur nógvar starvsmøguleikar innan alla heilsutænastu og møguleikar fyri at arbeiða uttanlands, bæði hjá humaniterum stovnum og øðrum ótraditionellum støðum.

__Treytirnar fyri upptøku eru:__

- at umsøkjarin hevur lokið students-, HF-, HH-, HTX-prógv ella líknandi prógv
- skeið í fyrstuhjálp, áðrenn 1. útbúgvingarpartur er liðugur og
- annaðhvørt 8 mðr. arbeiðsroyndir og/ella
- uttanlandsferðir og -uppihald
- háskúlauppihald ella líknandi
- aðrar ikki gjøgnumførdar útbúgvingar

Umsóknarbløð og nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Sjúkrasystraskúla Føroya, Eirargarður 14 B, tlf. 313540, lokal 435/436.

__Umsóknarfreist mikudag 31. mai 2000.__

Øll, ið ynskja fleiri upplýsingar og ætla sær at søkja inn á Sjúkrasystraskúlan verða boðin til ein kunnandi fund antin __3. mai 2000 kl. 19.30__ ella __10. mai 2000 kl. 19.30.__

**Tilmelding á tlf. 313540, lokal 435/436 millum kl. 9 og 12.**

# Hús í Klaksvík til sølu

Hús á Ósávegi 9 í Klaksvík til sølu.

**Tlf. 0045 45961253**

**SP/F GRANNSKOÐARAFELAGIÐ RASMUSSEN & WEIHE**

# Bókhalds- og roknskaparstarv

Til eitt reiðaravirki við heimstaði í Tórshavn verður søkt eftir einum roknskaparkønum fólki.

Arbeiðið umfatar bæði bókhalds- og roknskapararbeiði og aðrar fyrisitingarligar uppgávur. Tann, ið setast skal í starvið, má hava góðan kunnleika til bókhald og roknskap og kunnu arbeiða sjálvstøðugt.

Praktiskar royndir frá vinnulívinum eru ein fyrimunur.

Felagið hevur stórt samskifti við onnur lond, og kunnleiki til fremmand mál – ið hvussu er enskt – er neyðugur.

Løn sambært avtalu.

Skrivlig umsókn skal í seinasta lagi 22. mai 2000 sendast til Grannskoðarafelagið Rasmussen & Weihe, har áhugað eisini kunnu fáa nærri upplýsingar um starvið.

**RASMUSSEN & WEIHE**
Statsautoriserað grannskoðarafelag P/F
**An associated firm of** PriceWaterhouseCoopers

Á Glaðsheyggi
P.O. Box 30
FO-110 Tórshavn
Tlf. (+298) 311017
Fax (+298) 311018

Sp/f nr. 267
e-mail:
rasmussen @rasmussen.fo
Http://www.rasmussen.fo

# Landrover



**DEFENDER 90, árg. 1999**

Innregistreraður fyrstu ferð sep. 1999, væruvognur, bert koyrt 6.000 km, er uppá allar mátar sum nýggjur. Ikki-roykjari. Liturin er myrk metal grønur við hvítum. Útgerð: Sóltak, lættmetalfelgur, lyktagittar og er botnviðgjørdur. Prísurin er í dag 281.000 kr., selist fyri hægsta boð yvir 160.000 kr. + mvg og selist vegna flyting.

**Tlf. 313426 - 318150**

**Undirvísingar- og mentamálastýrið**
**Landsmiðstøðin fyri undirvísingaramboð**

**Starvið**
Í Undirvísingar- og Mentamálastýrinum/ Landsmiðstøðini fyri Undirvísingaramboð eru nakrir tímar sum ráðgevar leysir at søkja til setanar frá 1. august 2000.

Ráðgevingin fatar um øll lærugreinaøkini í fólkaskúlanum, skúlabókasavnið og KT-økið. Dentur verður lagdur á, at arbeitt verður í tvørgreinaligum høpi, og møguleiki er at søkja eina ella fleiri lærugreinir – eisini tvørtur um lærugreinaøkini.

Samanlagt eru 81 lønartímar um vikuna at søkja (ein lønartími svarar til umleið 1 1/2 fyrisitingartíma). Vanliga verður ráðgevi settur við 8 til 12 lønartímum um vikuna.

**Førleikakrøv**
Umsøkjarar eiga at hava hollan ástøðiligan kunnleika og starvsligar royndir í viðkomandi lærugrein/-um og starvsøkjum, starvið fevnir um. Ynskiligt er, at umsøkjarar hava hollan førleika á KT-økinum, og væntað verður, at teir eru hugaðir at nýta KT í ráðgevastarvinum.

**Setanar- og lønartreytir**
Lærugreinaráðgevin verður sett/settur eftir avtalu millum Fíggjarmálastýrið og Føroya Lærarafelag. Tann, ið sett/settur verður, skal undirvísa írestandi tímarnar í skúlanum, har viðkomandi starvast dagliga.

Ein starvslýsing er galdandi fyri ráðgevastarvið. Lagt verður upp til eitt skipað samstarv millum ráðgevarnar, møguliga í tvørgreinaligum bólkum.

**Umsókn**
Umsókn við prógvum o.ø. verður send Landsmiðstøðini, Hoyvíksvegi 72, Postrúm 3084, 110 Tórshavn. Vegna nú lokna arbeiðssteðg er tíðarfreistin fyri innlating sett til hósdagin 11. mai 2000.

Gjøllari upplýsingar fáast við at venda sær til Landsmiðstøðina, tlf. 318825.

**Undirvísingar- og Mentamálastýrið
og
Landsmiðstøðin fyri Undirvísingaramboð**

**Undirvísingar- og Mentamálastýrið** hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentamál og gransking. Harumframt hevur stýrið uppgávur, ið viðvíkja kirkju, loftmiðlum, ítrótti og øðrum frítíðarvirksemi. Landsmiðstøðin er stovnur undir Undirvísingar- og Mentamálastýrinum. **Landsmiðstøðin** sýnir fram og lænir út undirvísingaramboð, hevur verkstaðarmøguleikar, hevur saman við Undirvísingar- og Mentamálastýrinum eina lærugreinráðgevaskipan og skipar fyri fak- og inspiratiónsskeiðum fyri lærarum.

# Bilur í serklassa til sølu

Rætti bilurin til tann, sum vil hava tí fullkomnu koyrigleðina.

| | |
|---|---|
| Typa: | OPEL OMEGA 2.5 V6 |
| Orka: | Bensin |
| Effekt: | 180 HK |
| Árgang: | 5/96 |
| Koyrt: | 60 tkm |



Møgulig fígging kann útvegast, annar bilur kann takast inn ella gev eitt kontant boð.

Myndir av bilinum kunnu sendast áhugaðum ella hygg á heimasíðuna hjá Opel www.opel.com

Meira fæst at vita við at ringja til Jákup S. Joensen á tlf. 213536 ella 333536.



# Bilur við skaða til sølu

**Merki:** Peugeot Boxer, vøruvognur
**Árg.:** 1997
**Km:** 149.000

Bilurin verður seldur sum hann stendur nú og kann síggjast á bilskaðadeildini á Hálsi.

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

Beinleiðis tlf. 34 57 27
Fartelefon nr. 28 38 92
fax nr. 34 56 07
Fróði Müller
at hitta millum kl. 1300–1500

VINNUHÚSIÐ
House of Industry

# Skeið í starvsfólkarætti

**– galdandi á privata arbeiðsmarknaðinum**

Føroya Arbeiðsgevarafelag (FAG) skipar tann 25. og 26. mai 2000 fyri skeiði í starvsfólkarætti.

**Endamál**
Endamálið við skeiðnum er at geva leiðarum og starvsfólkum, sum fáast við hesi viðurskifti, yvirlit yvir galdandi lógir og reglur á økinum og gjøgnumganga ávís evnir.

**Á skránni er m.a.:**

- Arbeiðstíð, døgndrift og skiftisvaktir
- Løn, viðbøtur, yvirtíð, starvsaldur
- Frítíð og frítíðarløn
- Barnsburðarfarloyvið, sjúka
- Setan, uppsøgn og burturvísing

**Grundarlagið fyri skeiðnum er:**

- Lønarsáttmáli millum Føroya Arbeiðarafelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag
- Sáttmáli millum Føroya Arbeiðsgevarafelag og S&K/Føroya Arbeiðarafelag
- Starvsmannalógin, frítíðarlógin, løgtingslóg um fráveru vegna barnsburð v.m.

**Undirvísing**
Skeiðið verður í høvuðsheitum skipað sum undirvísing og kjak, tó verður bólkaarbeiðið eisini á skránni.

**Undirvísarar**
Bjørgfríð Ludvig, ráðgevi og Kristoffur Laksá, næsformaður í FAG.

**Praktisk viðurskifti**
Skeiðið verður á Hotel Hafnia. Kostnaður er kr. 3.300,- fyri hvønn. Íroknað í prísinum er matur og skeiðtilfar.

Tekning fer fram hjá Føroya Arbeiðsgevarafelag á tlf. 311864 ella á telduposti: __fag@industry.fo__ í seinasta lagi 11. mai 2000 kl. 12.00.

*Halt* **sosialin**

# Ruddingardagar í Tórshavnar kommunu

Fríggjadagin 12. og leygardagin 13. mai 2000 verða ruddingardagar í Tórshavnar kommunu.

Rusksekkir fáast ókeypis á Skálatrøð fríggjadagin og leygardagin og við Róðrarneystið á Argjum leygardagin.

Feløg, skótar, ítróttarfeløg o.fl. fara at stuðla hesum tiltaki við at rudda hvørt sítt øki og verður burturkastið heintað av Tórshavnar kommunu. Onnur hava eisini møguleika at rudda frí- og felagsøkir, og verður hetta ruskið eisini heintað av kommununi.

Eisini verður høvi hesar báðar dagar at sleppa av við bilvrak o.a. við at venda sær til Brandstøðina, tlf. 31 48 81.

---

**__Sekkir (skiljing av ruski)__:**

__Grønir sekkir__: rusk ið kann brennast (pappír, óviðgjørdur viður, posar o.a.)
__Klárir sekkir__: rusk ið ikki brennur (glas, metal, dekk, gamalt hegn o.a.)

Dálkandi burturkast, so sum akkumulatorar, máling, imp. viður o.a., skal leggjast og avhendast fyri seg á Skálatrøð ella á Brennistøðini á Hjalla.

**__Annað órudd__:**
Órudd frá privatum húsarhaldum skal latast til Brennistøðina á Hjalla.

Opið er soleiðis:

Fríggjadagin kl. 08.00 - 20.00
Leygardagin kl. 08.00 - 20.00

**Ringjast kann til teknisku deild býráðsins (reinhaldið) á tlf. 31 55 13 í samband við ruddingardagarnar.**

*Tórshavnar kommuna*

# Hús í Mikladali

Vegna Føroya Skiftirætt verða ognirnar matr. nr. 113 og 103, Mikladalur, sum eru ávíkavist sethús og neyst, lýst til sølu um hóskandi boð fæst.

Føroya Skiftirættur tilskilar sær rætt til at velja millum tilboð, ið koma inn, og til einki at góðtaka.

Nærri fæst at vita um hesar ognir við at venda sær til skrivstovu okkara:

**Advokatskrivstovan**
**Fr. Petersensgøta 9**

Halgir Winther Poulsen, adv. — Magnus S. Petersen, adv.
Fríða Patursson, adv. — Ólavur Jákup Kristoffersen, adv.
Christian Andreasen, adv. — Niels Winther Poulsen, adv.

**Tlf. 311145**

# Ársaðalfundur hjá Fjallbrúður

verður í hølum felagsins 30.5. kl. 19. Skrá sambært lógum felagsins.

**Nevndin**


# Liggur eisini tú vakin nátt eftir nátt???

SNORENZ steðgar snorkanini!



Sosialurin - 311820

Nú er evnið funnið, ið steðgar snorkan. Avmarkar smorkiljóðið í 97% av øllum tilburðunum

**Øll snorka!**
Vísundaligar kanningar hava víst, at øll fólk onkuntíð snorka. Snorkan er eitt andadráttsljóð, sum kemst av, at vevnaðurin í hálsinum og svølgrúmið darra.

**Nú kann tað steðgast!**
Tað kollveltandi evnið Snorenz verður heilt einfalt pistrað í munnholuna har tað leggur eitt tunnt lag yvir tað aftasta av svølginum, tunguni og úlvinum. Hetta hevur eitt bloytandi árin á vevnaðin og ger, at ein árin á vevnaðin og ger, at ein svevur friðaliga í heilt upp til 8 tímar.



**Heilt uttan hjáarin**
Snorenz, ið er ein ektað natúrvøra ríkað við vitaminum, verður tikið upp av slímhindunum og ein verður ikki turrur í munninum.



Ring 21 79 16

**Fæst eisini í Heilsu í SMS**

Nærri upplýsingar ella faldari fæst hjá: **Vello Føroyar**
Boks 354 - FO-700 Klaksvík • Tlf: 217916 - Fax: 457916

**VEGG SAGING**
Hurðar,vindeygu, veggir, garðar o.a.

**HOL SAGING**
Frá Ø 24 mm. til Ø 450 mm.

**GÓLV FRESING**

**GÓLV SLÍPING**

**GÓLV SAGING**
Rennir, keiøki, asfalt, upptøka og burturbeining o.a.

**FØROYA BETONG SAGING** v/Hjaltur Tausen
Gerðisvegur • 620 Runavík • Tel. 447543 • Fax 448898

Sosialurin - 311820

**Hjá okkum fáast vognar og útgerð til __allar__ flutningsuppgávur!**

- Viðfestisvognar sum lasta frá 325 kg. upp til 2.600 kg. –nógv model!'
- Eykalutir til viðfestisvognar
- Sekkjavognar, hydr. lyftiborð –arbeiðsbord
- Vognar til gassfløskur, oljutunnur, kassar, trappir –óteljandi møguleikar!
- Gafflar til heisan av plattum, vøru o.a.
- Tip - Ruskkonteinarir til trukkar
- Spennireimar og lyftistroppar
- Sleipikrókar til øll bilmerki!

Tosið við okkum!

**Kaj Andreasen & Co**
Sandvíkarhjalli - Tel. 315600 - Fax 318008

Sosialurin - 311820